


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 01 - 2013

# Gylt ár fyri íløgum í frálandavinnu

Vaksandi leitivirksemi og útbyggingar av oljukeldum serstakliga á djúpum vatni kring heimin hevur við sær, at íløgur í nýggj frálandaskip og útbúnað í hesi vinnu fer at vaksa við 31% í ár sammett við seinasta ár væntar ráðgevarafyritøkan Clarkson Research. Áhugin hjá orkufyritøkum at gera íløgur í leiting og kanningar og framleiðslu á djúpum vatni kring heimin, harímillum í økjunum vestan fyri Hetland og harvið eisini tætt upp at føroyska markinum fer at vaksa munandi í 2013. Roknað verður við, at bygging av nýggjum frálandaskipum og útbúnaði á djúpum vatni fer at seta met við 639 nýggjum sáttmálum í hesum árinum. Hetta er ein vøkstur uppá góð 30% í mun til í fjør, tá sáttmálar vórðu gjørdir fyri 489 skip. Vøksturin tykist at gerast enn størri komandi árini. Næstu fimm árini verður mett, at tað í meðal fara at verða bygd 686 nýggj før, sum er nakað hægri enn meðaltalið í árunum 2005 til 2011 uppá 649 skip um árið. Millum hesi nýggju skipini komandi árini teljast eisini fleiri føroysk frálandaskip. Mynd Thor í Hósvík er eitt av reiðaríunum, sum ger stórar íløgur í nýggj frálandaskip. Kelda Thor.